## Tryggja friðin

Her í Helmand hevur NATO hermenn úr íalt 37 londum, harav Danmark er eitt teirra. Deildin í Afghanistan kallast ISAF - International Security Assisstance Force.

Uppgávan er at hjálpa afghansku stjórnini at fáa og hava eftirlit við landinum, soleiðis at møguleikar verða fyri tryggleika og endurbygging.

Arbeiðið verður gjørd í tøttum samstarvi við afghanskar trygdardeildir, eins og stuðul og ráðgeving verður givin til at byggja upp ein afghanskan her.

Tá Valdimar og hansara herdeild koma til Afghanistan um miðjan februar verða teir ikki á nakran hátt sleptir leysir í oyðimørkini. Her verður skipað fyri eini venjing, har teir millum annað skulu læra at leita eftir minum, brúk handgranatir og aðrar týðandi uppgávur.

Hetta er alneyðugt at vita, tá ein er staddur í einum øki, har ein talibani kann standa undir næsta horni og bíða eftir at drepa tann fyrsta hermannin, sum vísir seg.

- Hóast vit ikki vita um øll viðurskiftini enn, so verða vit væl fyri til uppgávuna. Men hinvegin, vit mugu allatíðina hava í huga, at vit ikki eru eitt hersetingarvald, men at vit eru friðarstuðlar.

- Fremsta uppgávan hjá okkum er at skipa soleiðis fyri, at friðurin kann verða varðveittur her. Vit skulu eisini vísa teim lokalu, at vit eru har fyri teirra skuld, slær Valdimar fast.

# Sovi róliga hóast eg

**- Eg bleiv sera kløkkur og illa við, tá eg hoyrdi at tveir danskir hermenn vóru deyðir í Afghanistan. Men hetta hevur ikki avskrekt meg eitt einasta petti, sigur Valdimar Tjørnudal av Signabø. Hann er í løtuni undir útbúgving í danska herinum, og fer í næsta mánaði til Afghanistan**



HERMAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Signabøur/Afghanistan: Tú ert púra svakur. Tú ert ordiliga cool!

Tað er skoðsmálið sum vinmenn hansara hava givið honum, nú hann sunnudagin fer til Danmarkar at fyrireika seg til nakrar mánaðir sum hermaður í ófriðarliga landinum Afghanistan.

Teir verða stasjoneraðir í sunnara parti av landinum, í Helmand-landslutinum, har tað búgva omanfyri 1 mió menniskju. Endamálið er at niðurberja uppreistrarliðini hjá Taliban-rørsluni og varðveita friðin í økinum.

- Eg veit, at hetta er vandamikið arbeiði. Men hetta er tað sum eg vil, sigur 27 ára gamli Valdemar róliga og við sannføring.

Hann er í løtuni heima í jólafrí. Sunnudagin gongur leiðin til seinastu venjingarnar í Danmark, áðrenn leiðin verður løgd móti teirri spennandi uppgávuni í Afghanistan.

### Góð útbúgving

At síggja til er Valdimar als ikki typan, sum ein kann ímynda sær ganga í herklæðum á einum hermóti sunnarlaga í Afghanistan.

Stóri áhugi hansara fyri tí hernaðarliga gjørdi kortini sítt til, at hann byrjaði sum herskyldugur í danska herinum í februar mánaði í fjør.

Eftir at hesin fyrsti parturin var lokin, ynskti Valdimar at halda fram, og byrjaði í juni eina útbúgving innan Hærens Reaktionsstyrke Uddannelse – stytt HRU.

Henda útbúgvingin fevnir í fyrsta umfari um eitt skúlaskeið í átta mánaðir og síðani seks mánaðir í tí veruliga lívinum.

Tað er júst gjøgnum hesa útsendingina, at Valdimar nú fær møguleikan at sleppa allan vegin til tað ófriðarliga landið Afghanistan.

- Eg eri tendraður at fara avstað, sigur hann róliga.

### Nógvir gevast

Fyri ein pilt kann tað kanska tykjast spennandi og manslígt at fara inn í "a real army" og gera skyldu sína heima ella úti.

Men tá teir veruliga fara undir útbúgvingina, og seinni skulu standa andlit til andlits við fíggindan, kann vera at mangir teirra venda bakið til hetta lívið.

Tað vísir seg nevniliga, at nógvir teirra gevast stutt eftir at herskyldan er lokin. Teir klára ikki sálarliga trýstið, tí teir hugsa kanska ov nógv um vandan við at fara avstað, ella tí at teir ikki fáa fullan stuðul heimanífrá.

- Men eg havi so ikki ligið í andvekri, orsakað av at eg skal til Afghanistan, sigur Valdimar púra róligur.

Støðan gerst ikki betri av, at hann er vitandi um at fleiri hermenn longu eru falnir í bardøgum við talibanar. Millum hesar teljast eisini fleiri danskir soldátar.

Hóast hann um fáar vikur skal á ófriðarliga hermótið har suðuri í Afghanistan, sæst hetta ikki á honum.

Hann tykist meiri spentur at sleppa avstað og vera við at fullføra ta uppgávuna, sum danska herleiðslan hevur tikið á seg í Helmand-landslutinum.

> *Men eg havi so ikki ligið í andvekri, orsakað av at eg skal til Afghanistan*

### Troytt av talibanum

Skal nakað sigast um Afghanistan slepst ikki undan at nevna herviliga borgarakríggið sum tey seinastu mongu árini hevur lagt landið lamið – um ikki í oyði.

Stríð og ósemja, bardagar, løstir, sorgartár, morð, terror og alt annað sum hoyrir einum kríggi til, er gerandiskostur og ein partur av gerandisdegnum hjá einum stórum parti av fólkinum í Afghanistan.

- Tað sum vit hava fingið at vita er, at fólkið snøgt sagt er vorðið troytt av talibanunum og atsóknum teirra. Tey ynskja frið, og tí eru tær friðarvarðveitandi herdeildirnar vælkomnar, sigur Valdimar.

> *Eg meini, - eg eri so ungur og skal longu skriva eitt testamenti og kanska eisini eitt afskedsbræv til míni kæru*

Í nógvum bygdum í økinum er lítið eftir av ungum monnum og monnum, tí teir eru falnir í kríggi ella álopum frá talibanunum. Ella teir kanska júst eru talibanar sjálvir!

Samstundis sum arbeitt verður við at byggja landið uppaftur, millum annað við vegagerð, bygging av skúlum og veitingum av ymiskum slagi, verður somuleiðis roynt at fáa bæði góð viðurskifti og skapa álit við tey lokalu.

Umvegis hetta samstarvið ber til at fáa fatur á talibanhermonnum og avvápna teir. Tann yngsti talibanurin, sum teir vita um, var ikki meiri enn stórt 16 ára gamal.